UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Dagfesting: **10. mars 2022**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 21/08502-77**

Svar

upp á

skrivligan § 52a fyrispurning nr. 52-135/2021 frá Eyðgunn Samuelsen, løgtingskvinnu, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum, um prógvtøkur á miðnámi summarið 2022.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Ætlar landsstýrismaðurin at gera tillagingar í prógvtøkunum á miðnámi í summar?
2. Kann tað hugsast, at talið á prógvtøkum verður broytt, soleiðis at næmingarnir skulu upp til færri prógvtøkur í summar?
3. Um nei til spurning 2, kann tað hugsast, at landsstýrismaðurin sum eitt alternativ vil minka pensumkravið í einstøku lærugreinunum í sambandi við prógvtøkurnar í summar?

Svar

Til 1: Eisini hetta skúlaárið hevur verið merkt av korona, og tað hevur darvað læruúrtøkuni, at bæði næmingar og lærarar ein part av árinum hava verið sjúkir ella í sóttarhaldi. Eg fari tí aftur í ár at leggja lógaruppskot fyri Løgtingið fyri at fáa heimild til at gera tillagingar í prógvtøkunum á gymnasialum miðnámi.

Sum spyrjarin nevnir, hava danir tikið avgerð um, at talið av prógvtøkum í summar skal verða lægri hjá eldru flokkunum á gymnasialum miðnámi. Av tí at flestu føroyingar, sum lesa víðari uttanlands, fara undir hægri lestur á útbúgvingarstovnum í Danmark, og Føroyar hava eina avtalu við danskar myndugleikar, sum javnstilla føroysk prógv við tey donsku, ætli eg at gera líknandi tillagingar í okkara prógvtøkum. Hædd verður tó tikin fyri, at okkara skipan er ikki meinlík tí donsku.

Við hesum vilja vit tryggja føroysku næmingunum, ikki minst teimum eldru flokkunum, sum skulu til endaliga prógvtøku í summar, somu fortreytir sum teimum donsku næmingunum.

Til 2: Ja. Lógaruppskot, sum heimilar broytingum í kravda talinum av prógvtøkum verður fyrireikað í løtuni og væntandi lagt fyri Løgtingið í næstum. Fylgt verður við, hvørjar tillagingar verða gjørdar í Danmark, og lagt verður upp til, at leisturin verður at líkna við tann danska, men tillagaður okkara skipan.

UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður